


*Nr. 24* *24. november 2013* *73. árg.*

# Alt er gjørligt hjá Gudi

*Tað, sum er ógjørligt hjá monnum, er gjørligt hjá Gudi.*
*Luk. 18,27.*

Mangan møta vit tí ógjørliga. Uppgávur, ið skulu loysast, og sum vit ikki makta. Byrðar, ið verða lagdar á okkum, og sum vit ikki orka at bera. Menniskjur, ið tørva hjálp, og sum vit ikki klára at hjálpa á rættan hátt. Stúranir, ið vinnast skal á, kasta skuggar á vegin, og vit vita ikki, hvat vit skulu gera. Tað ómøguliga er okkum ov sterkt.

Tað versta av øllum er, at vit sjálvi eru ómøgulig. Tú kanst ikki umskapa teg sjálvan og ert ikki førur fyri at gera longslar tínar til veruleika. Hóast roynt verður av øllum alvi, verður tú við undirlutan. "Eg skilji ikki meg sjálvan," sigur Paulus, og tað sama sigur ein og hvør, sum torir at gera upp við seg sjálvan.

Tað má ikki føra til at vit fara at tykja synd í okkum sjálvum ella til passivitet; tvørtur ímóti eigur tað at kalla okkum til fruktabart ágrýtni. Hvussu gera vit tað? Við at flýggja. – Tað ljóðar løgið. Er tað at flýggja ikki tekin um mótloysi og at blaka frá sær? Nei, ikki altíð.

Tað at viðurkenna ábyrgd og máttloysi, noyðir meg at flýggja. Tá ið eg skilji, at eg eri ein skuldari, kann eg ikki møta roknskapardegnum við treysti, uttan saman við einum, sum vil frelsa meg. Ein, sum eg kann flýggja til. Hvønn? Hann, sum hevur sagt: „Tað, sum er ógjørligt hjá monnum, er gjørligt hjá Gudi."

Gud **kann**. Lat tað standa fast! Og Gud **vil**. Lat tað vera galdandi! Tá ið tann altvaldandi Gud kann og vil, er tað meining í at flýggja inn til hansara, og so passar tað, at tað fruktabara ágrýtnið sæst aftur í eini dagligari flýggjan til Guds. Ikki burtur frá ábyrgdini.

Ábyrgdini kann ongin flýggja frá. Men undir ábyrgd inn til Guds; tað er vegurin til veruligt frælsi. Bert við at síggja sannleikan í eyguni, sannleikan um tað ómøguliga, verður vegur lagdur fyri trúnna á tann Gud, sum onki er ógjørligt hjá.

*Hvør Harran eina letur ráða*
*og á hann lítur lív og lund,*
*tí bjargar hann úr alskyns váða*
*og hjálpir hann á neyðarstund;*
*hvør lít til himna setur svá,*
*hann kyksendi ei byggir á.*

*Guds veldishond kann ongin binda,*
*hans sterka orð ei svitast man,*
*til jarðar kann hann ríkan rinda,*
*og arman upp hann lyfta kann;*
*Gud eina hevur henda mátt*
*at fella brátt og reisa hátt.*

*Við lov og bøn gakk Harrans leiðir,*
*og røkta trúgvur verk títt alt,*
*tá signing tú í væntan eigur,*
*og hvønn dag hana njóta skalt;*
*tí hvør, við Gudi samleið fer,*
*av honum ikki svikin er.*

# Sjey undur á deyðastrá

*"Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt." Áps. 16,31.*

Lise Karlsen greiddi frá á Visjon Norge, tá ið vermóðir hennara Edvina lá at doyggja. Hon lá á sjúkrahúsi og hevði ógvuliga nógva pínu. "Halt tvørtur um meg og bið fyri mær," segði hon við Lisu.

Løtu seinni sigur hon við Valentin, mann sín: "Tú, Valle, Gud hevur lovað okkum, at øll børn okkara skulu verða frelst. Allir tríggir dreingirnir eru frelstir; men allar sjey genturnar eru ófrelstar."

Maðurin hevði staðið og hugt út gjøgnum vindeygað. Nú vendi hann sær spakuliga á. "Vina, tú fert skjótt foldum frá og inn í dýrdina; men bønir tínar verða verandi her niðri, og tær halda á at vera virksamar, so genturnar verða frelstar, eftir at tú ert farin heim."

"Nei, nei, eg vil, at genturnar skulu verða frelstar, áðrenn eg fari hiðani, tí tað hevur Gud lovað mær. "Tú og hús títt skulu verða frelst," ljóðar lyftið. Eg standi við báðum beinum fast plantaðum á hesum lyftinum."

Løtu seinni kom ein dóttir fyri og onnur eftir inn á sjúkrastovuna til mammuna. Allar fullu tær á knæ við songarstokkin, og mamman legði hondina á høvur teirra og bað frelsubønina við teimum.

Eina lítla løtu seinni dró hon sítt síðsta suff og fór inn í dýrdina.

Hon hevði staðið rimmarføst á lyftinum og hevði ikki latið seg vika. Bønarbørn verða frelst.

*Effie Campbell* umsetti.

# Orðið er tað einasta, sum heldur

Jan Hanvold

Eg lesi altíð í einari ella aðrari bók. Tað geri eg fyri at fáa íblástur og fyri at byggja upp trúnna í lívi mínum. Hetta at byggja upp og at halda trúnna við líka er ein lívslong læra, sum ongantíð má enda. Hvønn dag stendur Bíblian, bók bókanna, fremst í míni lesiætlan. Tað er Guds orð, sum heldur í øllum umstøðum, og sum hevur svarið til allan tørv okkara bæði til anda, sál og likams. Sum menniskja broytist lív okkara í tíðarskeiðum, og kenslurnar ganga ymsar leiðir frá kæti niður í djúpasta mótloysisdalin. Stúranir og óreinir tankar royna at fáa fótafesti í sinni okkara. Okkara sinni er sum ein vígvøllur, og har eru dyrnar, sum djevulin roynir at sleppa inn í fyri at leypa á okkum.

Tá er bara eitt at gera: At sleppa sær inn í Guds Orð. Jes. 40,29 sigur: "Hann gevur hinum maktaða megi og hinum máttleysa mikla styrki; ungmenni møðast og maktast, og unglingar níga; men teir, ið vóna á Harran, fáa kraft av nýggjum og hevja seg sum á arnarveingjum; teir renna og ikki møðast og ganga og ikki maktast." Tá forloysir Guds orð tað, sum tað nevnir. "Gud mín skal eftir ríkidømi sínum til fulnar bøta um alla neyðsyn tykkara í dýrd í Kristi Jesusi." Fil. 4,19. Harri, navn títt er El Shadai, sum merkir: Tann Gud, sum gevur meir enn nokk.

Guds orð í munni okkara fremur tað, sum tað nevnir (Jes. 55,11). "Men hav tú Harran, Gud tín, í huga, tí at hann er tann, sum gevur tær megi til at vinna tær eyð, til tess at hann fær hildið tann sáttmála, sum hann svór fedrum tínum, eins og hann eisini ger enn í dag."

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð er máttmikið

Einaferð fekk ein kona mann sín, sum var fríteinkjari, at lesa í Bíbliuni ein tíma um dagin. Tá ið nakrir dagar vóru farnir, segði hann við konu sína: "Hevur henda bókin rætt, so stendur illa til hjá okkum."

Nøkur kvøld seinni segði hann: "Góða kona, hevur henda bókin rætt, so eru vit glatað."

Fá kvøld seinni segði hann: "Hevur henda bókin rætt, kunnu vit verða frelst."

Og tey vórðu frelst.

*t.* týddi.

# Syndasorg

*Tí mína synd eg sanni, og yvir míni misbrot eg syrgi.  Sálm. 38,19.*

Syndasorgin letur upp vegin til fyrigevingina. Jesus prísaði tey sæl, sum syrgja – og tollarin í templinum fann vegin inn til Guds hjarta í allari sorgini um syndina.

Kunnu vit ikki vera ov dapurskygd? Kunnu vit ikki lættliga fara at gera okkurt til synd, sum als ikki er synd? Eg haldi ikki, at vit kunnu vera ov álvarsom, tá ið talan er um synd!

Í vísuni um Dagmar drotning fáa vit at vita, at hon syrgdi um syndina, sum hon hevði gjørt, og syndin var, at hon ein sunnudag hevði snørt silkiermarnar ov nógv! Tvætl! – siga kanska summi. Fyri henni var hetta ikki tvætl, men rama álvara.

Vit kunnu ikki vera ov eftirsíggin við syndini í lívi okkara. Eldri vit gerast í Guds skúla, neyvari fer ljósið av himli eisini at avdúka syndina í lívi okkara.

Angur er eitt orð, sum skylt er við orðið eingil! Tí er hetta umráðandi: Kveistra ikki angurin ella syndasorgina burtur frá tær, tá ið tey taka búgv í tær. Við teimum sendir Gud í himlinum tær boð.

*Men tráar at sannleiks Gudi tín lund,*
*og kallar tú av tínum inna,*
*hans náði teg leiðir á Harrans fund,*
*tú frelsara tín tá skalt finna.*

*t.* týddi.

# Teg grípi eg

Tá ið týski professarin í søgu, Friedrich Wiegand, lá at doyggja, bað hann næstringarnar siga alheiminum, at ein trúgvandi náttúrugranskari var deyður. Hansara seinastu orð vóru:

„Gud, tú, sum hevur endurloyst meg, - teg grípi eg; eftir tær tystir sál mín.” Á gravsteini hansara stendur:

„Á teg, Harri, havi eg vónað; tú vilt ikki lata meg verða til skammar!”

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 24. nov. | Tekstur: | 2. Mós. 4,1-17 og 12,28-40; | bíbliuorð: | 2. Mós. 12,13 |
| 1. des. | Tekstur: | 2. Mós. 7,14 -11,10 + 12,7-14; | bíbliuorð: | Sálmur 3,9 |
| 8. des. | Tekstur: | Matt. 1,18-24; | bíbliuorð: | Matt. 1,20 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74